# 324.000 afturat til landsliðið

Tilgóðarseðilin hjá føroysku landsliðsspælarunum í fótbólti eitur nú 180.000 krónur, eftir at Føroyar í gjár tóku seg enn tvey pláss upp á styrkislistanum hjá FIFA. Har er føroyska fótbóltslandsliðið nú at finna sum nummar 120, og tað eru tvey pláss betri enn tað, sum var at síggja á seinastu útgávuni av listanum. Tey liðini, sum eru dottin niður um Føroyar, er Antigurnar, Fiji-oyggjarnar og Georgia, meðan Azerbadjan hevur yvirhálað. Ikki minst er tað áhugavert, at Georgia verður styrkismett lægri enn Føroyar, men enn skulu vit altso framvið bæði Kasakhstan og Aserbadjan, áðrenn Føroyar flyta ein styrkisbólk upp í seedingini, sum verður gjørd undan lutakastinum til undankappingar. Her eru Føroyar tó í niðasta styrkisbólkinum til komandi lutakastið til EM-undankappingina, so ein møgulig uppflyting má bíða í tvey ár, til lutakastið til næstu HM-undankapping verður. Fjarstøðan upp til Kasakhstan og Azerbadjan er tó lítil. Ávíkavist 6 og 17 styrkisstig. Samlaða bonus-upphæddin, sum FSF sambært sáttmálanum við spælararnar nú skal gjalda, er nú komin upp á 4.860.000 krónur.



álopið kundi byrja, og Madeira slapp at reka allan vegin frameftir, uttan at nakar av føroyingunum fór í hann ella nóg avgjørdur royndi at steðga honum. Endin var, at andorianarin kom í góða skotstøðu og síðani smekkaði so væl til, at Jóan Pauli Dahl Jakobsen í føroyska málinum ongan møguleika hevði at verja fyri.

## Svaraðu ikki aftur

Hetta kom ikki føroyska liðnum væl við, men hóast veruleikin nú var, at liðið stóð við einum stigi, var tað ikki nóg mikið til at fáa ein størri stríðsvilja ella eitt meira sannførandi avrik fram í okkara spælarum, ið annars fyrr í kappingini hava víst, at teir kunnu stríðast til síðsta blóðsdropa.

Avrikið var snøgt sagt ikki nóg gott, og eftir at tey bæði málini í dystinum vóru komin, var hvørki av liðunum heldur í nánd av at fáa eitt sigursgevandi 2-1 mál. Eitt gott føroyskt gjøgnumbrot var tó aftrat í dystinum, ið kundi givið mál, men áðrenn tað nakrantíð kom so langt, hevði dómarin bríkslað fyri onkrum, og so spurdist einki burturúr.

Hvønn týdning, úrslitið hevði fyri teir 22 á vøllinum, sást eisini týðuliga, tá dysturin endaði, tí meðan teir frá Andorra fegnaðust, sum høvdu teir vunnið, hingu føroyingarnir við høvdinum, sum høvdu teir tapt. Har var ikki ein einasti, ið upp á nakran sum helst máta helt orsøk vera til at fegnast um hetta stigið, tí tað var trígjar ferðir so lítið, sum nøsin var sett upp eftir!



**Vøllurin á Estadi Comunal í Andorra La Vella var vánaligur, bæði knortlutur og smalur, so tí bleiv meira sparkað enn spælt**
Mynd: Fótbóltssambandið

## Samlaða avrikið

Eftir stendur tó, at føroyska U21-landsliðið hevur havt eina øgiliga góða EM-undankapping higartil, og burtur úr teimum sjey dystunum eru fingin átta stig, sum í løtuni geva okkum eitt fjórðapláss, tí nú er Moldova dottið afturum og hevur eitt stig minni enn Føroyar, men tó fyri bara fimm dystir. Andorra er framvegis aftast, men hevur so fingið sítt fyrsta stig.

Tá skuffilsið yvir dystin leygardagin hevur lagt seg, man lítið vera at ivast í, at spælararnir eisini síggja, at teir eru partur av einum kollektivi, ið er í ferð við at laga føroyskum fótbólti ein góðan varða, umframt at øll hava orsøk at fróast um, at gott er í væntu hjá A-landsliðnum í komandi árum.

Tveir dystir eru eftir at spæla í hesi EM-undankappingini, men teir verða ikki spældir fyrr enn seint næsta summar. Tá skulu Føroyar fyrst í august spæla á heimavølli ímóti Andorra og síðani á útivølli í september ímóti Moldova. Hetta eru tey bæði liðini, sum Føroyar hava fingið javnleik ímóti hesi kappingini.

## FAKTA

*EM-undankapping 2009/2010 fyri U21-landslið*

**Andorra-Føroyar 1-1 (0-1)**

**0-1:** Jóan Símun Edmundsson, 32.
**1-1:** David Madeira, 51.
Estadi Comunal, Andorra La Vella, leygardagin 21. november 2009 klokkan 14.00
**Andorra (4-5-1):** Oriol Oliva – Cristian Martínez, Adrian Rodrígues, Emili García, Marc García – Samir, Marc Vales (Cristian Orosa, 92.), Carles Sirvan, Àlex Roca, David Madeira (Joseph Vall, 61.) – Jöel Martínez (Gerard, 73)
**Á bonkinum:** Francesc Planes, Eric Buixó, Albert Ribera, David Rodríguez
**Gult kort:** Cristian Martínez, 50.
**Venjari:** Justo Ruiz Gonzalez
**Føroyar (4-4-1-1):** Jóan Pauli Dahl Jakobsen – Jóhan Troest Davidsen, Rógvi Holm, Dánjal Davidsen, Pól Jóhannus Justinussen – Finnur Justinussen, Bogi Løkin, Kristoffur Jakobsen (Karl Løkin, 82.), Jóan Símun Edmundsson – Christian Restorff Mouritsen (Róaldur Jacobsen, 74.) – Øssur Dalbúð (Jóhan Ellingsgaard, 59.)
**Á bonkinum:** Hans Jørgensen, Rógvi Poulsen, Pætur Jørgensen, Hallur Hansson
**Gult kort:** Finnur Justinussen, 83.
**Venjarar:** Heðin Askham & Bill McLeod Jacobsen
**Dómari:** Gabriele Rossi, San Marino
**Hjálpardómarar:** Massimo Zanotti & Andrea Guidi, San Marino
**Fjórði dómari:** Stefano Podeschi, San Marino
**UEFA-umboðsmaður:** Milos Markovic, Serbia
**UEFA-dómaraeygleiðari:** Plarent Kotherja, Albania

**U21: EM-undankappingin – Bólkur 1**

| Nr. | Land | Dystir | V-J-T | Mál | Mál +/÷ | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Russland | 7 | 6-0-1 | 20-2 | +18 | 18 |
| 2 | Rumenia | 7 | 6-0-1 | 19-6 | +13 | 18 |
| 3 | Lettland | 7 | 3-0-4 | 13-12 | +1 | 9 |
| 4 | Føroyar | 8 | 2-2-4 | 5-14 | ÷9 | 8 |
| 5 | Moldova | 6 | 2-1-3 | 4-10 | ÷6 | 7 |
| 6 | Andorra | 7 | 0-1-6 | 1-18 | ÷17 | 1 |

# Ótrúliga skuffandi



**Annar av venjarunum, Heðin Askham, er sera skuffaður av, at U21-landsliðið bert skuldi fáa eitt stig ímóti Andorra**
Mynd: Álvur Haraldsen

**– Um nakrar dagar síggi eg kanska øðrvísi upp á tað, men beint nú eri eg ótrúliga skuffaður, tí vit ikki fingu meira burtur úr dystinum ímóti Andorra, sigur annar av venjarunum hjá U21-landsliðnum, Heðin Askham**

Hóast U21-landsliðið hevði fýra stig í viðførinum heimaftur til Føroya í gjárkvøldið, var hýrurin meira merktur av tveimum mistum stigum í Andorra, enn trimum vunnum í Lettlandi. Og tað merkti eisini viðmerkingina frá øðrum av venjarunum, Heðini Askham:

– Sjálvt um eg væl veit av, at hetta samanlagt er í lagi, so eri eg allíkavæl ótrúliga skuffaður av seinna dystinum beint nú. Tað er ikki í lagi, at vit koma heimaftur úr Andorra við bara einum stigi, men soleiðis er veruleikin tíverri, staðfestir hann.

– Um vit í staðin høvdu fingið eitt stig í Lettlandi og trý í Andorra, høvdu vit hinvegin verið ovurfegnir, so eg veit væl, at hetta er ein kensla, sum er eitt sindur løgin. Um nakrar dagar síggi eg kanska øðrvísi upp á tað, men beint nú eri eg ótrúliga skuffaður.

Heðin Askham skal tó bara hava eina lítla løtu at hugsa seg um í, so hevur hann eitt sindur lættari við at tosa um samlaða avrikið. Og tá sær hann allíkavæl eitt lítið sindur ljósari upp á tað.

– Tað, sum hetta U21-landsliðið hevur avrikað higartil í hesari EM-undankappingini, er nakað av tí flottasta, føroyskur fótbóltur nakrantíð hevur avrikað. Og bara tað, at vit kunnu loyva okkum at vera so misnøgdir við hetta, sum okkara landsliðsár nú endaði við, fortelur vælsaktans eisini eitt sindur um eina ella aðra menning, sum gongur rætta vegin, sigur hann.

## Missa til A-landsliðið

Saman við Bill McLeod Jacobsen hevur Heðin Askham staðið á odda fyri U21-landsliðnum, sum í hesi EM-undankappingini vann ein sensationellan sigur á Russlandi í juni og trígjar mánaðir seinni fekk javnleik 1-1 ímóti Moldova, fyri síðani mikudagin at vinna á Lettlandi og nú leygardagin at spæla javnt ímóti Andorra.

Bara tað, at liðið hevur fingið stig í fýra av sínum átta dystum og nú er uppi á átta stigum, við Moldova og Andorra aftan fyri seg á stigatalvuni, er eitt ovurstórt avrik í sær sjálvum. Og Heðin er sannførdur um, at enn meira býr í liðnum, sum hann heldur vera sera væl samansett:

– Vit hava ein góðan málmann, nakrar kempur í verjuni, góðar bóltspælarar á miðvøllinum, umframt at vit har frammi hava framherjar, ið duga at skjóta mál. So tað teknar gott, heldur hann, samstundis sum hann er sannførdur um, at liðið ikki sleppur at halda fram við øllum spælarunum, sum nú eru við.

– Brian Kerr var við á ferðini í Lettlandi og Andorra, og eg ivist onga løtu í, at hann – serliga í fyrra dystinum – hevur sæð spælarar, hann kundi hugsað sær at fingið upp á A-landsliðið.

hil